# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Grímur Sundstein, løgtingsmaður

**Svarari:** Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

**Evni:** Endurgjald fyri AMEG goldið í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd

**Spurningar:**

1. Hevur Fíggjarmálaráðið gjørt nakra endurgjaldsætlan fyri AM-gjøld, sum TAKS vegna AMEG hevur kravt inn í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd fyri árini áðrenn 2019 ?
2. Verður eitt møguligt endurgjald goldið afturvirkandi til, tá norðurlendski sáttmálin um sosiala trygd fekk gildi, uttan fyrning og við rentum ?
3. Ætlar landsstýriskvinnan at strika kravið um, at undantak at rinda AMEG bert verður veitt eftir umsókn ?

**Viðmerkingar:**
Í ársfrásøgnini fyri 2023 hjá AMEG undir 'eventualskyldur' stendur m.a. at lesa, at - '*Í 2023 tók Eystari Landsrættur avgerð til fyrimunar fyri teir, ið høvdu kært Heilsutrygd fyri at krevja heilsutrygdargjald frá persónum, sum sambært Nordisku konventión ikki skulu rinda sosial gjøld í tveimum londum, tá rættur bert er til útgjald í øðrum landinum. Nú ið avgerðin er fallin, hevur stýrið vent sær til Fíggjarmálaráðið við spurninginum um, hvussu grunnurin skal fyrihalda seg. Stýrið fyri grunnin metir, at av tí at tað er TAKS, sum krevur gjøldini inn, er tað TAKS og Fíggjarmálaráðið, ið hava tulkingarrættin.*'

Heilsutrygdargjaldið er tíverri bert eitt av fleiri sosialum gjøldum, sum í Føroyum hava verið kravd í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd [NS]. TAKS hevur í mong ár sýtt teimum føroyingum, m.a. útisiglarum, sum starvast í øðrum Norðurlondum og eisini rinda sosial gjøld har, undantøku at rinda til AMEG, vísandi til at ongin heimild var í føroyskari lóggávu at veita slík undantøk. Tó eru hesi viðurskifti komin 'partvíst' í rættlag við lógarbroyting aftur til 2019, men TAKS krevur, at umsókn verður send, áðrenn undantak verður játtað. Tó hevur TAKS ikki veitt undantak fyri árini áðrenn 2019. Nú fimm ár eru liðin, er vanliga fyrningarfreistin fyri peningakrøv farin.

Høvuðsreglan í NS er, at persónur sum útgangsstøði bert rindar í arbeiðslandinum. Sambært NS kann ein persónur ikki verða fevndur av lóggávu í tveimum londum samstundis. Tað ber heldur ikki til samstundis at brúka lóggávuna í einum landi til eitt slag av trygdarveiting og lóggávuna í einum øðrum landi til eitt annað slag av sosialari veiting. Við verandi mannagongd, har TAKS krevur umsókn, áðrenn undantak verður játtað, rindar hesin áður umrøddi bólkur sosial gjøld í tveimum londum samstundis, ið er í ósamsvari við NS.

Nú Heilsumálaráðið er komið til ta niðurstøðu, at heilsutrygdargjaldið verður endurgoldið, verður hesin fyrispurningur settur fyri at vita, um Fíggjarmálarráðið eisini ætlar at endurrinda tey sosialgjøld, sum TAKS vegna AMEG hevur kravt inn í heimildarloysi. Harafturat verður spurningur eisini settur við, um krav um umsókn verður varðveitt, tá ið manglandi umsókn hevur við sær, at persónur tí rindar sosial gjøld í tveimum londum samstundis.

**Á Løgtingi, 24. oktober 2024**

Grímur Sundstein